## Flogbóltsgalla á Viðareiði

Leygarkvøldið 27. mars verður stóra flogbóltsgallaveitslan hjá flogbóltinum á Hotel Norð á Viðareiði. Borðreitt verður við trimum rættum, og sum vanligt verður hæddarpunktið á kvøldinum, at ársins bestu spælarar verða heiðraðir. Tilmelding fer fram á gallaveitslan2010@gmail.com.



## TB vil í Eik-liguna

Stendur tað til flogbóltsmenninar hjá TB, spæla teir í Eik-liguni næsta ár. Sum tað sær út, endar TB sum nummar trý í 1. deild hjá monnum, og tað gevur rætt til at søkja um at koma upp í Eik-liguna. Í TB siga tey, at fara at gera sítt til, at besta mansdeildin komandi ár verður fimm lið.

# Undirhaldandi ungdómsflogbóltur

**Aftur í ár var TB vertur fyri stóra finaludegnum hjá teimum 14 ára gomlu og unglingunum í flogbóltinum. Og enn eina ferð eydnaðist tiltakið sera væl – ikki minst við nógvum vælspældum og spennandi finalum**



einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Longu hóskvøldið var Teraflex-gólvið komið suður, og beinanvegin fóru tvøramenn mannsterkir at leggja gólvið á í ítróttarhøllini í Trongisvági, so tað fekk frið at liggja í eitt samdøgur, áðrenn nakar fór á tað.

– Tá eg sá, hvussu nógvar hjálpandi hendur vóru klárar og hvussu góður hýrurin var á fólki, fekk eg varhugan av, at vit fóru at fáa enn ein einastandandi góðan finaludag. Og tað fingu vit eisini aftur hesa ferð, sigur Otto Gram frá TB, sum stóð fyri at samskipa tað nógva, sum skuldi fáast upp á pláss undan hesum stóra degnum.

Bara tað, at hetta serliga gólvið var brúkt, so teir ungu spælararnir høvdu somu umstøður sum tey vaksnu, ið stutt frammanundan høvdu spælt steypafinalurnar, gjørdi sítt til, at karmurin var sera góður. Men ikki bara á gólvinum, men eisini rundanum, var gott lív í.

– Tað vísti seg, at liðini, sum vóru komin norðanfjørðs, høvdu nógvar fjepparar við sær, so longu frá morgunstundini leygardagin koyrdi tað bara. Og tað gjørdist so ikki minni, tá lokalu fjepparanir byrjaðu at koma inn í høllina um miðdagsleitið, sigur Otto.

– Har mundu vera einar tríggjar ella fýra trummur, umframt at fleiri høvdu hesi lufttrýstshornini, so tú kanst ætla, at har var ein øgiligur gangur. Vit kundu snøgt sagt ikki ynskt okkum betur karmar um tiltakið, enn vit fingu.

Tað, sum alt fyrst og fremst snúði seg um, vóru kortini sjálvir dystirnir.



Sannur hátíðardámur var rundan um finaludagin í Trongisvági. Her eru tað gentur 14 ár hjá TB, ið fáa síni gullheiðursmerki

Mynd: FBF

Dráttur og SÍ spældu fyrst finaluna hjá dreingjum 14 ár, áðrenn kvinnuunglingarnir hjá Fleyr og KÍF fóru í gongd. Síðani spældu gentur 14 ár hjá TB og KÍF, og at enda var so finalan hjá mansunglingunum millum TB og Fleyr.

### Smyril mátti bíða

– Serliga hesin seinasti dysturin gjørdist eitt veruligt brak av einum dysti. Liðini fylgdust alla somlu tíðina og hvørki slapp frá hinum. Tað kundi tí ikki enda við øðrum, enn einum fimta setti, sigur formaðurin í Flogbóltssambandinum, Magnus Tausen, ið sjálvur var til staðar í Trongisvági leygardagin.

– Dysturin gjørdist so drúgvur, at tá farið var í holt við fimta sett, máttu vit ringja til Smyril fyri at fáa teir at bíða í fimm minuttir. Tað játtaðu teir, men fimta settið gjørdist so ótrúliga spennandi, at Smyril mátti bíða í eitt heilt korter. Ikki fyrr enn Fleyr vann 22-20, endaði fimta settið, og so ráddi bara um hjá spælarunum at skunda sær avstað til bátin.

Hvør dystur í kappingini byrjaði upp á sama máta sum tær stóru finalurnar hjá teimum vaksnu, tí spælararnir komu inn á vøllin ein og ein og blivu presenteraðir. Millum dystirnar spældu ungir tónleikarar livandi tónleik, og eftir finalurnar fingu vinnandi liðini steyp og heiðursmerki, umframt at bestu spælararnir á hvørjum liði eisini fingu eina gávu.

– Hetta gekk so væl, at vit longu nú liggja framvið at sleppa at skipa fyri FM-finaludegnum næsta ár, sigur Otto Gram, ið helst eisini hevur góðan møguleika fyri tí, so væl sum tað er eydnast við fyrireikingum og avgreiðslu av tiltakinum hvørja ferð hjá teimum í TB.

## FM-finalurnar

**Dreingir 14 ár:**
Dráttur-SÍ 0-3
**Bestu spælarar:**
Rúni Christiansen, SÍ, og John Olivar Edvardsson, Dráttur

**Kvinnuunglingar:**
Fleyr-KÍF 3-2
**Bestu spælarar:**
Anja Danielsen, Fleyr, og Bára Johannesen, KÍF

**Gentur 14 ár:**
TB-KÍF 3-1
**Bestu spælarar:**
Marin Dimon, TB, og Bára Johannesen, KÍF

**Mansunglingar:**
TB-Fleyr 2-3
**Bestu spælarar:**
Rói Hentze, Fleyr, og Magnar Vang, TB



## Bára skaraði framúr

**Var besti spælari í tveimum finalum – bæði hjá gentum 14 ár og kvinnuunglingum!**

Mest eyðsýndi spælarin í Trongisvági leygardagin var Bára Johannesen úr KÍF. Hon gongur bara í áttanda flokki og hevði tí aldur til at vera við í finalunum hjá bæði gentum 14 ár og kvinnuunglingum.

Hóast KÍF tapti báðar finalurnar, so vísti Bára seg at vera týðandi styrkur fyri liðini. At hon megnaði at verða vald sum besti spælari í báðum deildunum, sigur heldur ikki so lítið.

Serliga gjørdi hon við sínum góða spæli stóran mun í finaluni hjá kvinnuunglingunum, har KÍF var 0-2 aftanfyri í settum ímóti Fleyr, men fekk bart seg upp á 2-2, so eitt fimta sett mátti til. KÍF var enntá frammanfyri 10-8 í fimta setti, men endaði kortini við at tapa tað og dystin.

Millum teirra, ið hugdu at finalunum leygardagin, fekk Bára Johannesen bestu skoðsmál, og hóast KÍF í vetur hevur verið botnproppur í Eik-liguni hjá kvinnum, kunnu spælarar við hennara dygdum vísa seg at merkja fyri KÍF, at felagið hevur gott í væntu í framtíðini.

hil